# KLAKSVÍK

## SØGA, ROYNDIR OG FRAMTÍÐ



KLAKSVÍKAR KOMMUNA

# HER ER LÍVLIGT OG LIVILIGT



## VÆLKOMIN TIL KLAKSVÍKAR KOMMUNU



Fyrstu búsetingarnar í Norðoyggjum eru frá aldargamlari tíð. Her í økinum hava fólk í øldir virkað og livað undir teimum treytum, náttúran hevur givið teimum. Í 20. øld vaks lokaløkið – við Klaksvík í miðdeplinum – til eina drívmegi í føroyska samfelagnum. Vinnulívið treivst væl her, og nýggju møguleikarnir høvdu við sær stóra fólkatilflyting. Eitt sterkt og fjølbroytt vinnulív er framvegis grundarlagið undir lokalsamfelagnum, og vinnulívið kann bjóða spennandi størv og avbjóðingar.



Fólkatilflyting og nýggjar tíðir høvdu við sær, at brúk var eisini fyri virksemi av øðrum slagi – ítrótti, mentan, átrúnaði og frítíðartilboðum. Og her hevur Klaksvík gingið undan á mongum økjum. Ein nýmótans – og nú útbygd og dagførd – svimjihøll, ítróttarhallir, fimleikarhallir, fótbóltsvøllur og aðrir karmar hava skapt grundarlag fyri einum sera virknum ítróttar- og frítíðarlívi.

Mentanin stórtrívist eisini her í økinum. Landsins størsta tónleikatiltak, Summar Festivalurin, verður hildin í Klaksvík, og onnur tiltøk sum Norðoyastevna, Sjómannadagar og Torradagar eru partur av mentanarligavirkseminum, sum eisini bjóðar mong onnur tilboð. Arbeitt verður nú eisini við útbyggingum á mentanarøkinum, so tey virknu feløgini í kommununi fáa enn betri karmar at virka undir, og fólk fáa nýggjar møguleikar at uppliva mentan og list.

Klaksvíkar kommuna er ein vælvirkandi og væl útbygd kommuna við góðum tilboðum innan skúla, barnaansing, ungdómslív, eldraøkið og onnur øki. Her kunnu fólk í øllum aldri fáa eina góða og gevandi tilveru, og vitjandi eru vælkomin og kenna seg vónandi væl her í økinum.

Sum býráð hava vit sett okkum fyri at fáa Klaksvík at vaksa. Seinastu trý árini er fólkatalið vaksið við stívliga 80 fólkum, og hetta er eitt greitt tekin um ein livandi bý við vinnu, mentan og góðum kørmum til barnafamiljurnar.

Nøkur av málunum, sum Klaksvíkar býráð hevur sett sær fyri at náa, er at fáa meiri fjølbroytta bústaðarbygging – her eru ítøkiligar ætlanir í gongd. Vit vilja eisini hava eitt enn meira fjøltáttað vinnulív og eisini virka fyri at fáa meiri upplivingarbúskap í økinum – tað fáa vit millum annað við at hýsa stórum tiltøkum av øllum hugsandi slagi. Klaksvík skal eisini bjóða skúlar og skúlaskap, og býraðið viðvirkar til at fáa fleiri útbúgvingar til býin og eisini betra umstøðurnar hjá skúlum í økinum.

Onkuntíð verða norðoyingar sagdir at verða lokalpatriotiskir, men ivaleyst er hetta bert eitt tekin um, at fólkið her í økinum er framfýsið, hevur eitt stórt ynski um at skapa eina góða tilveru og hevur ein sterkan vilja at søkja møguleikar og standa saman um síni áhugamál. Men vit eiga ikki at gloyma, at júst ein slík drívmegi er ein stórur vinningur fyri Føroya land og fólk.

Eg vil ynskja øllum vitjandi hjartaliga væl komnum til Klaksvíkar, og eg vóni, at tit kenna tykkum væl millum okkum her í økinum.

**Jógvan Skorheim,**
*borgarstjóri*



# KLAKSVÍK



Tvær víkir, onnur størri, hin minni, stórbærin, høg og fjølbroytt fjøll báðumegin báðar víkirnar, og Kunoyggin ein hábærsligur verjugarður fyri aðra og víðopið hav so langt eyga røkkir, tá tú stendur við hina.





Soleiðis verður tú boðin vælkomin til høvuðsstaðin í Norðoyggjum, Klaksvík, ein býur og ein kommuna, hvørs menning og broytingar farnu 100-125 árini teljast millum tær størstu.

Søguliga hevur tú altíð siglt til Klaksvíkar, men í dag kemur tú ígjøgnum Norðoyatunnilin, ið varð tikin í nýtslu 29. apríl 2006. Og fyrstu upplivingina fært tú longu miðskeiðis í Norðoyatunlinum, har marglitta lýsandi listarverkið hjá Trónda Patursson kann síggjast.

Klaksvík er ein fjølbroyttur býur við nógvum tilboðum til bæði borgarar og ferðandi. Her eru sjófólk og fiskimenn, fólk í alivinnu og í fiskivinnuni á landi. Her eru næmingar, lærlingar, ófaklærd, handverkarar, kokkar, skrivstovufólk, lærarar, miðlafólk, mentafólk, ítróttarfólk, sjúkrasystrar, akademikarar og nógv nógv onnur, ið tilsamans mynda henda býin og gera hann til tað, hann er.

Her eru alskyns møguleikar, hevur tú hug at íðka ítrótt, tað veri seg fótbólt, hondbólt, flogbólt, svimjing, kaving, renning ella okkurt heilt annað, eins og ein ørgrinna av mentanartilboðum, so sum hornorkestur, dansifelag, listafelag, sjónleikarfelag, biografur og bókasavn.

Í Klaksvík eru fleiri ansingarstovnar, fólkaskúli, húsarhaldsskúli, miðnámsskúlar, tekniskur skúli, kvøld-, ungdóms- og listaskúli,og tú kanst nema tær útbúgving innan eitt nú matvøru og sjóvinnu.

Handilslívið er gott og fjøltáttað, og ætlar tú tær á matstovu ella á kafé og eisini í býin, eru fleiri møguleikar. Til ber at gista, og serlig tiltøk, so sum Torradagar, Norðoyastevna, Summarfestivalur, Sjómannadagur, Jólaskipið og Atlantic Fair, fevna yvir alt árið. Og vilt tú uppliva farran av gomlu útróðrarmentanini, kann ein túrur norður á Stengurnar viðmælast.

Náttúran er eisini vøkur og fjøltáttað. Viðarlundin úti í Grøv er vøkur og friðsæl, og hevur tú hug at fara á fjøllini, eru nógvir møguleikar.

## EIN BÝUR Í STØÐUGARI MENNING…

# VINNAN

Upprunaliga var Klaksvík ikki ein bygd og ei heldur nakar býur, men nakrir býlingar, har landbúnaður var høvuðsálitið. Men tá fiskivinnan av álvara ger vart við seg seinast í 1800 og fyrst í 1900 talinum, er Klaksvík fyri stórum broytingum.

Tá Klaksvík gerst sjálvstøðug kommuna í 1908, er fólkatalið umleið 700, í 1930 búgva 1.409 fólk í Klaksvík, og í 1970 er íbúgvaratalið heili 4.266 fólk – ein vøkstur, sum í høvuðsheitum stavar frá vinnulívsmonnum, ið taka stór tøk, serliga í fiskivinnuni.

Ein teirra er J. F. Kjølbro, sum ivaleyst er ein av størstu og máttmiklastu vinnulívsmonnum, ið hava verið í Føroyum. Kjølbro varð føddur í Gerðum í Klaksvík í 1887. Upprunaliga ætlaði Kjølbro sær á læraraskúla, men ístaðin fer hann, 15 ára gamal, í starv í handlinum hjá Faktor Djurhuus, sum er í bygninginum, har Norðoya Fornminnasavn húsast í dag.

Kjølbro setur av álvara føtir undir egið borð, tá hann og beiggin Dávur úr Gerðum í 1913 keypa sluppina Solo Deo Gloria, og nú eru lunnar av álvara lagdar undir risafyritøkuna J. F. Kjølbro, sum – tá hon er í hæddini, telur omanfyri 1.000 starvsfólk, útróðrarbátar, línuskip, trolarar, farmaskip, ferðamannaskip, fiskavirkir, hermetikkvirki, fiskamjølsvirki, sleipistøð, skipasmiðju, jarnsmiðju, spinnarí, vaskarí, heilsølu, timburhandil, matvøruhandil, búnýtishandil og klædnahandil.

Virkisfýsni og hugflog seta framvegis stóran dám á vinnulívið í Klaksvík, ikki minst í fiskivinnuni, sum framvegis hevur stóran týdning fyri Klaksvík og føroyska samfelagið. Og tað er neyvan av tilvild, at Klaksvík verður roknaður sum fiskivinnuhøvuðstaður í Føroyum.





*Í 1930 gjørdi J. F. Kjølbro fyritøkan egnar myntir, sum kundu nýtast í handlunum hjá fyritøkuni*

## J. F. KJØLBRO, EIN AV STØRSTU OG MÁTTMIKLASTU VINNULÍVS-MONNUM, IÐ HEVA VERIÐ Í FØROYUM.



# CHRISTIAN Í GRÓTINUM




**Søga, royndir og framtíð eru afturvendandi felagsnevnarir, tá talan er um støðuga menning. Og júst hetta – drúgvar royndir og hugflog, samantvinnað við dirvi til at bróta upp úr nýggjum, eyðkenna eina av teimum størstu verkætlanunum innan føroyska fiskivinnu – eina verkætlan, sum Kristian Martin Rasmussen og synirnir Jón, Eyðun og Bogi taka stig til.**









Í mai mánað 2009 kemur Norðborg á Klaksvík á fyrsta sinni. Eitt sera vakurt og slógbrótandi skip, ið teir hjá Christian í Grótinum hava ment til at gerast eitt av heimsins mest framkommnu fiskiskipum.

Øll framleiðsla fer fram umborð, og øll fiskasløg koma til heildar. Nakað, ið bæði er lønandi og burðardygt.

Lunnarnir til fyritøkuna vórðu lagdir í 1971, tá Palle Rasmussen og sonurin Kristian Martin keyptu saltfiskalínuskipið Borðoyarnes frá J. F. Kjølbro, meðan grundarlagið til høvuðsvirksemið hjá felagnum í dag finna vit, tá felagið fær nýbygningin Christian í Grótinum, ið fer av bakkastokki á Skála Skipasmiðju í 1975, og sum er fyrsta nótaskipið, ið fær heimstað í Klaksvík.

Í dag reka Kristian Martin Rasmussen og synirnir Jón, Eyðun og Bogi framkomnu nótaskipini Norðborg og Christian í Grótinum.

Framleiðslan fevnir yvir sild, makrel, svartkjaft og lodnu, ið verður seld í Europa og Fjarðeysturi, og omanfyri 100 fólk starvast í reiðaríinum.

# JFK

Farnu úti við 100 árini hevur JFK samtakið verið ein týðandi og eisini virðisløntir partur av føroyskari fiskivinnu, og soleiðis er eisini í dag.








## JFK SAMTAKIÐ ÚTFLYTUR FISKAVØRUR TIL ALLAN HEIMIN

Virksemið umfatar so at siga allar tættir í fiskivinnuni: Felagið eigur og rekur skipini Gadus, Sjúrðarberg, Stjørnuna, Polarhav, Næraberg, Slættaberg, Vestmenning, Skoraberg, Kvikk og Núp, og er harumframt eisini partur av reiðaríunum, sum eiga Klakk, Jákup B, Safir, Smaragd og Grønanes.

Eisini er JFK størsti partaeigari í Kósini, sum eisini eigur Northern Fish Cold Storage, og sum bæði verða rikin av JFK.

Uttanfyri landoddarnar hevur JFK eisini gjørt vart við seg. Frá 2006 til 2013 hevði felagið nógv virksemi í Grønlandi, og eftir ein stuttan steðg er JFK nú aftur farið til verka har.

JFK samtakið útflytur fiskavørir til so at siga allan heimin, og framleiðslan umfatar bæði saltfisk eins og nógvar frystar fiskaúrdráttir. Eitt nú matstovur, skúlar og sjúkrahús teljast millum viðskiftafólkini, og hevur tú roynt fish and chips í Bretlandi, hevur tú mest sannlíkt smakkað uppá fiskin frá JFK.

Eini 600 fólk starvast í JFK samtakinum.





# KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ






Fiskiskip, útróðrarbátar, skip til ferðafólk og bilferjur, sandbátar, og skip, ið arbeiða innan oljuvinnu, farmaflutning og alivinnu. Øll hesi og ivaleyst onnur við, finnur tú norðuri á „Bedingini", sum sagt verður í dagligari talu í Klaksvík.

Hetta litríka og fjølbroytta virksemi av skipum við kei og á beding, handverkarum og smiðjubygningum, byrjaði, tá brøðurnir J. F. Kjølbro og Dávur úr Gerðum í 1928 stovnaðu Klaksvíkar Sleipistøð.

Klaksvíkar Sleipistøð er í dag ein vitanar fyritøka í støðugari menning, sum – umframt umvælingar og viðlíkahald, eisini er ein heildarveitari, tá talan er um tænastur til skip og bátar, eitt nú við einasta verkstaðnum í Føroyum til dieselpumpur.

Fyritøkan umboðar millum annað CAT motorar og elrikin spøl frá spanska veitaranum IBERCISA, og fyrstu spølini eru latin Ruth og Beinur, ið eru tvey nýggj nótaskip, ið verða bygd á Karstensens Værft í Danmark.

Klaksvíkar Sleipistøð umboðar IBERCISA í Føroyum, Danmark, Svøríki, Grønlandi, Onglandi, eins og í ensku Kanaloyggjunum.

50 fólk starvast á Klaksvíkar Sleipistøð, sum harumframt setur í minsta lagi 4 nýggjar lærlingar um árið.

## KSS ER EIN VITANAR FYRITØKA Í STØÐUGARI MENNING

# LOOKNORTH

Í Klaksvík eru fyritøkur, ið hava nógv ár á baki, eins og fyritøkir, ið royna nýggjar vinnumøguleikar. Ein teirra er Looknorth, ið varð stovnað í 2000, og sum framleiðir vørur úr skúmplasti og harðplasti.





Looknorth er eitt framkomið virki, ið framleiðir m.a. flutningkassar til fiski- og alivinnuna eins og innpakking og aðra útgerð í samband við vørufluttning, ymiska útgerð til alivinnuna, so sum flot og gonguristir til aliringar, og bjálvingarplátur til byggivinnuna.

Looknorth økir støðugt um vøruúrvalið, eins og virkið eisini framleiður vørur eftir ynski, eitt nú tá talan er um lutir til PR.

Looknorth framleiðir til bæði føroyska og útlendska marknaðin, og í løtuni verður útflutt til Íslands, Noregi og Kanada, samstundis sum sølusáttmálar til onnur lond eisini eru á gáttini.












# HAVNAVIÐURSKIFTI Í HEIMSFLOKKI





Eina av heimsins bestu náttúruhavnum finnur tú í Klaksvík. Og við Norðurhavnini kann Klaksvík bjóða heimsins størstu skipum at bryggju.

Hetta hevur eisini nógvar ferðavinnumøguleikar við sær, eitt nú við risastórum ferðamannaskipum, sum bíleggja atløgupláss í Klaksvík.

Í 2012 legði eitt av heimsins størstu skipum fyri fyrstu ferð at bryggju í Klaksvík, og var hetta tá størsta skip, sum hevði verið í Føroyum. Talan er um 320 metrar langa ferðamannaskipið Celibrity Eclipse, sum síðani hevur verið aftur á Klaksvík fleiri ferðir. Fyrsta túrin vóru 3.200 ferðafólk umborð, meðan manningin taldi 1.400 fólk.

Umstøðurnar eru eisini góðar í Klaksvík. Náttúran er sjáldsama vøkur, eins og nógvir útferðarmøguleikar eru í Norðoyggjum. Harumframt eru góðir handilsmøguleikar, eins og nógv áhugaverd støð eru at vitja. Og hevur tú hug at síggja ein størri part av Føroyum, kanst tú koyra til 75% av landinum innanfyri ein tíma.







# HEIMSINS STØRSTA SMOLTSTØÐ



Nú í 2017 ger Bakkafrost eina íløgu í eina smoltstøð, sum verður roknað at vera heimsins største.

Endamálið við smoltstøðini er at minka um alitíðina hjá laksi á sjónum við 6 mánaðum. Støðin, sum verður bygd á Strond í Klaksvíkar Kommunu, skal kunna ala smolt úr rognum upp til at smoltið vigar 500 gram.

Støðin verður tekniskt sera framkomin við nýggjastu tøknini innan reinsan av vatnum. 99,9% av vatninum fer støðin at kunna endurnýta, tí verður nýtslan av vatni sera lítil. Í mun til framleiðsluna, og hetta er eitt frambrot.

At tíðin hjá laksinum á sjónum, til tøku, verður stytt við 6 mánaðum, hevur við sær, at avbjóðingin viðvíkjandi laksalús verður minin minni. Harafturat verður roknað við, at størri nøgd av aldum fiski kann fáast burturúr hvørjum fjørði, tí tíðin hjá laksinum á sjónum, saman við tíðini har økið skal liggja brak, verður stytt úr 24 mánaðum niður í 18 mánaðar.

Byggingin byrjaði í 2016. Bygningurin verður 320 metrar langur. Roknað verður við at framleiðslan skal byrja í fyrsta ársfjórðingi í 2018. Framleiðsluorkan verður umleið 7 milliónir smolt á 500 gram. Íløgan hjá Bakkafrost á Strond er mett til 650 milliónir krónur.



# FØROYA BJÓR



*Annika Waag, virkis- & góðskuleiðari saman við pápanum Einar Waag, stjóra á Føroya Bjór.*



Føroya Bjór er millum elstu fyritøkurnar í landinum, stovnað av Símun Hansen í 1888, og telist í dag millum fremstu fyritøkurnar í Føroyum.

Stovnarin Símun Hansen var undangongumaður á øllum økjum. Hann byrjaði sum handilslærlingur hjá Jørgen Bech & Sønner, sum yvirtóku Kongaliga handilin í Klaksvík, og síðani royndi hann seg á egnum beinum: Hann var bóndi og reiðari, og hevði handil, bakarí og bryggjarí. Eisini á øðrum økjum var Símun Hansen eins tilvitaður sum á vinnulívsøkinum. Hann taldist millum teirra, sum stovnaðu Dansistovuna, sum um aldarskiftið var mentanar- og savningarstaðið í Klaksvík, eins og hann var nógv ávirkaður av háskúlasrørsluni.

Føroya Bjór framleiðir í dag øl, sodavatn og saft. Meginparturin verður selt í Føroyum, men nakað verður eisini útflutt til Íslands og til Danmarkar.

Føroya Bjór hevur eisini fingið fleiri virðislønir fyri frálíku ølsløgini, eitt nú Montecelection virðislønina í Belgia, har Føroya Bjór vann gull.

Umleið 40 fólk starvast á Føroya Bjór.












# NORÐOYA SPARIKASSI






## NORÐOYA SPARIKASSI VENDUR SÆR TIL PRIVATKUNDAR OG SMÆRRI OG MIÐALSTÓRAR VINNULÍVSKUNDAR

Norðoya Sparikassi er ein nýmótans peningastovnur, sum hevur verið í einari støðugari menning, síðani hann varð stovnaður í Klaksvík í 1919.

Upprunaliga endamál sparikassans var at tryggja ein peningastovn, har sparipeningur og peningaumfar skuldi gagna Norðoyggjum og Eysturoynnið.

Til fyrst í nítiárunum vendi sparikassin sær í størstan mun til privatkundar, men í kjalarvørrinum av búskaparkreppuni, ið rakti Føroyar fyrst í 1990'unum, vóru partafelags- og bankalóggávurnar broyttar soleiðis, at eisini sparikassarnir kundu veita fígging til vinnulívið. Hetta kom væl við, tá største arbeiðsplássið í Norðoyggjum, Kósavirkið, skuldi fáast aftur á føtur, og sparikassin – sum eitt nú íleggjari saman við m.a. yrkisfeløgunum, var við til at tryggja at virksemi aftur kom á Kósini.

Norðoya Sparikassi er eisini ein peningastovnur, ið ofta roynir nýggjar leiðir, nakað, ið eitt nú sæst aftur við Silva, ið er eitt spennandi og fjølbroytt tilboð til børnini.

Sparikassin vendur sær til privatkundar og smærri og miðalstórar vinnulívskundar, og hevur høvuðssæti í Klaksvík og deildir í Fuglafirði, Saltangará og í Havn.

Norðoya Sparikassi er ein sjálvstøðugur peningastovnur, har ábyrgdarar velja umboðsráðið, sum síðani velur nevndina. Partur av avlopinum verður brúktur til vælgerandi og almannagagnlig endamál. Umleið 50 fólk starvast í Norðoya Sparikassa.

# MENTAN

## Í KLAKSVÍK FINNUR TÚ EITT RÍKT OG FJØLTÁTTAÐ MENTANARLÍV…



*Hallur Joensen og Charlie Pride*

Fyrsta føroyska rockplátan – hon kom út í sjeytiárunum, er við klaksvíksbólkinum Straight Ahead, fólkarockbólkurin Frændir hevur sín uppruna her, Hallur Joensen, ið hevur latið úr hondum sangir saman við eitt nú The Bellamy Brothers, Bobby Bare, Charlie Pride, Kris Kristofferson, Vince Gill og Sonya Isaacs, tók countrytónleikin til sín umvegis sín uppvøkstur í Klaksvík og frá saltfiskalínumonnunum, ið komu heim av Flemische Cap, og gamlaárskvøld 2013 fekk Føroya fremsti troubadurir, klaksvíkingurin Hanus G. Johansen, fyrstu Mentanarheiðursløninа, ið er latin í Klaksvík.

Umstøðurnar hjá tónleikarum eru eisini góðar í Klaksvík í dag. Á gamla Dávavirkinum, ið upprunaliga varð bygt sum flakavirki í 1960, eru fleiri venjingarhøli, eins og pallur eisini er í húsinum.

Tá talan er um myndlist, smæðist Klaksvík ikki burtur. Higani eru listarfólk sum millum onnur Elinborg Lützen, Frida Zachariassen, Frithjof Joensen, Hans Jákup Glerfoss, Hans Hansen, Amariel Norðoy, Olivur við Neyst, Archibald Black, Hanni Bjartalíð, Poulina Hoensen, Unn Joensen, Marianna Bjørgheim og Edward Fuglø.




*Eyð Matras fekk Mentanarheiðurslønina 2015.*



## NÝTT MENTANARHÚS



Palle Gregoriussen, arkitektur, hevur teknað eini 200 sethús umframt skúlar, listasavn, útvarpshús, handilshús, skrivstovubygningar og nógv nógv annað. Og ein av hansara vakrastu bygningum er posthúsið í Klaksvík, ið er bygt í sekstiárunum.

Henda arkitektoniska perlan í miðjuni í Klaksvík er nú seld einum felagi, hvørs endamál er at umskipa og útbyggja Posthúsið til mentanarhús, ið skal fevna um sjónleik, musikskúla, myndlist og býráðssal.



# CHRISTIANS-KIRKJAN





Christianskirkjan er størsti arkitektoniski varðin í Klaksvík. Kirkjan er teknað av danska arkitektinum Peter Koch, ið var kongaligur bygningsumsjónarmaður, og er – sum hin fyrsta stóra kirkjan í Norðurlondum, bygd í tráð við fornan norrønan byggihátt, og tekur – á sín egna hátt – við grótlaging og timburklædningi, reystari reising eins og íblásturi frá føroyskari neystabygging, støði í siðbundnari norrønari og føroyskari bygging.





Innan er Christianskirkjan, ið tekur 1.000 fólk, eins stórsligin og uttan, bæði tá talan er um arkitekturin og altartalvuna, ið danski listarmaðurin og professarin Joakim Skovgaard hevur málað. Omanfyri høvuðsinngongdina er ein vakur rundur mosaikrútur, sum ímyndar Kristus sum heimsins berandi mátt – eitt listaverk, ið er gjørt av donsku listarkvinnuni Ulrikke Marseen.

Í samband við 50 ára hátíðarhaldið hjá Christianskirkjuni í 2013, varð kirkjan listprýdd við verkinum „Jesus úr Nasaret" hjá Edwardi Fuglø. Verkið, ið telir tíggju rundar skurðmyndir og seks smærri vignettir, er framleitt á Tekniska Skúla í Klaksvík, her Edward afturat sær hevði møbilsniðkaran Sjúrð Sólstein, sum framdi sniðkaraarbeiðið.

## INNAN ER CHRISTIANSKIRKJAN, EINS STÓRSLIGIN OG UTTAN







# EDWARD FUGLØ



**Edward Fuglø er føddur í 1965 og telist millum Føroya fremstu fjøllistarfólk. Í 1985 fer Edward til Danmarkar, her hann í árunum 1987 til 1991 nemur sær útbúgving á Skolen for Brugskunst í Keypmannahavn.**





*Yvir heiðar, gil og vøtn*

*Fuglar og so villini djór tey vóru henni kunn*

Í 1991 flytur Edward heimaftur til Føroya, her hann hevur starvast sum fulltíðar listarmaður síðani. Og listarliga virksemið er fjølbroytt: Edward hevur málað og teknað, skrivað barnabøkur, ið hann sjálvur hevur myndprýtt, hann hevur designað pallmyndir til leikir, film og sjónvarp, designað búnar, og myndprýtt bøkur, fløgur og frímerki.

Edward Fuglø hevur eisini fingið fleiri virðislønir. Hina fyrstu fekk hann í 1995, tá hann fekk Barnabókaheiðursløn Tórshavnar Býráðs. Í 2001 fekk hann Nordisk Børnebogspris, hann hevur fingið fleiri virðislønir fyri frímerki, eitt nú úr Týsklandi og úr Kina. Og fyri búnarnar í filmi Katrin Ottarsdóttir „Bye bye Bluebird" varð hann tilnevndur Robert virðislønina í 2001, bara fyri at tríva í rúgvuna.

Til hátíðarhaldið í samband við at Hennara hátign Margretha drotning hevði sitið á trúnuni í 40 ár, lat Føroya Løgting og Føroya Landsstýri í 2012 drotningini eitt listarverk eftir Edward Fuglø – eitt val, ið Hennara hátign var sera fegin um. Og Edward telist eisini millum føroyingarnar í útgávuni av Bláu Bók, sum kom út 22. mai 2014.

Edward hevur eisini listprýtt fleiri bygningar, teirra millum Skúlan við Løgmannabreyt, har 135 metrar langa listarverkið „Yvir heiðar, gil og vøtn", prýðir Miðhøllina, Ósáskúlan við listarverkinum „The Seagull Has Landed", Landssjúkrahúsið við listarverkinum „Nornurnar", ið er ein frí tulking úr Norrønu gudalæruni, Det Nordatlantiske Hus í Odense, sum varð tikið í nýtslu í november 2013, og har Edward hevur málað sín fyrsta veggjamálning, eins og Edward hevur myndprýtt helmingin av kømurunum á Hotel Føroyum.

Í samband við 50 ára hátíðarhaldið hjá Christianskirkjuni í 2013, varð kirkjan listprýdd við verkinum „Jesus úr Nasaret" eftir Edward Fuglø – eitt listarverk, ið telir tíggju rundar skurðmyndir og seks smærri vignettir.

Edward Fuglø hevur havt framsýningar um stóran part av heiminum, eitt nú í øllum Norðurlondunum, og í Eysturríki, Fraklandi, Hollandi, Írlandi, Týsklandi, og í Japan.

# FORNMINNISAVNIÐ OG SPANIASTOVA





Norðoya Fornminnisfelag er stovnað í 1968, og húsast í einum av elstu bygningunum í Klaksvík – gomlu handilshúsunum, sum upprunaliga vóru ein deild av Kongaliga Einahandilinum, sum var avtikin í 1856.

Umframt eina ørgrinnu av gomlum lutum, hýsir Norðoya Fornminnissavn eisini fyrsta apotekinum í Klaksvík, og sum kann síggjast óbroytt í sama høli á savninum, har apotekið upprunaliga húsaðist.

Í sama bygningi finnur tú eisini Spaniastovu, hvørs navn stavar frá tíðini, tá saltfiskur til spanska marknaðin, varð framleiddur í húsinum. Men í dag er Spaniastova ramma um alskyns mentanartiltøk, ið eitt nú fevna um framsýningar, konsertir og sjónleik.













# VEVSKÚLIN



Í 1933 kemur ein lítil jolla á Hvannasund nevnd Rospiggen 1. Umborð er ein kvinna, ið einsamøll hevur siglt allan teinin úr Svøríki til Føroyar, hóast ætlanin upprunaliga var at sigla til USA. Komin í land í Klaksvík hittir hon Wendlu Biskupstøð, ið er ættað úr Svøríki og gift Hans bónda í Klaksvík – nakað, ið báðar gerast sera bilsnar av, tí Wendla hevði gingið á háskúla í Svøríki, har hon hevur havt Ainu sum lærara í veving og tekning á háskúlanum Näs, ið var ein háskúla fyri lærarar.

Talan er um Ainu Cederblom, sum verður verandi í Klaksvík eitt skifti, og sum hetta tíðarskeiðið tekur stig til Vevskúlan, sum framvegis er virkin. Og søguligi báturin Rospiggen 1, ið Aina einsamøll sigldi við til Føroyar, er framvegis í varðveitslu í Klaksvík.

Aina Cederblom gørdi eisini vart við seg eftir at vera farin úr Føroyum, eitt nú hevur hon skrivað tvær bøkur, hevur bygt ein vevskúla fyri fátækrar kvinnur í Brasilia, siglt eftir Donau ánnið til Svartahavið við Rospiggen 1I, eins og hon hevur heilsað uppá bæði Gandhi og Neri.

Og fyrrapartin í áttatiárunum ger svenska sjónvarpið SVT eina vangamynd av Ainu í sendingini „Her er dit liv", har eisini føroyingar luttaka.

# KÓPAKONAN







Hans Pauli hevur eisini gjørt standmyndina av einum hinum mætasta vinnulívsmanninum í Føroyum, klaksvíkinginum J. F. Kjølbro, sum livdi frá 1887 til 1967. Og Hans Pauli hevur eisini gjørt standmyndina av Kópakonuni, sum stendur á helluni niðanfyri bygdina Mikladalur á Kalsoynnið, og sum varð avdúkað 1. august 2014.

Hellan í Mikladali er ein sermerkt og øðrvísi uppliving, og her stendur Kópakonan og hyggur yvir helluna, sum tú í góðveðri kanst uppliva við at dvølja eina løtu ella spáka tær ein túr, meðan hellan hinvegin er ímyndin av náttúrunar kreftum, tá brimið leikar á.

Kópakonan stendur ytst á helluni. Trappur eru oman á helluna, so høgligt er at ganga. Til ber eisini at kika eftir Kópakonuni frá bakkanum, har kikari er settur upp til endamálið.

Søgnin um Kópakonuna er hon, at kópar av fyrstu tíð eru komnir av fólki, sum hevur sjálvt stoytt sær oman og forkomið sær á sjónum.

Á hvørjum ári fara kóparnir á land á helluni í Mikladali, har teir lata seg úr haminum, gerast menniskju og dansa og stuttleika sær til tann ljósa morgun. Hetta hevði mikladalsdrongur frætt um, og tískil fjalir hann hamin hjá vakrastu kópakonuni, soleiðis at hon ikki sleppur aftur til havs. Og hóast hon bønar og biðjur hann geva sær hamin aftur, er hann eirindaleysir, læsir hamin inni og giftist við Kópagentuni. Men ein dagin hann er á útróðri, hevur hann gloymt lykilin eftir heima. Og komin aftur til Mikladals hevur Kópakonan funnið bæði lykil og ham og farin aftur til havs. Komin á sjógv svimir brimilin, sum áður var maki hennara, móti henni, tí øll hesi árini hevði hann ligið har og bíða trúgvur eftir opnu síni.

Men mikladalsdrongurin lovar hevnd, og mong ár eftir ger hann av við brimilin og teirra hvølpar. Frammanundan hevði Kópakonan sagt mikladalsdronginum í dreymi, at um hann ger av við brimil hennara, skulu so summir mikladalsmenn sjólatast, meðan aðrir skulu detta oman, og so mangir, at hesir hond í hond skulu fevna um alla Kalsoynnað.

Ferja siglur til Kalsoynnað, og túrurin tekur einar 20 minuttir.





*Sera nógv fólk vóru samankomin í Mikladali, tá standmyndin av Kópakonuni varð avdúkað.*



# TILBOÐ & TRIVNAÐUR





















Fjølbroyttir arbeiðs-, útbúgvingar- og ansingarmøguleikar, og fleirtáttað mentanar-, ítróttar- og frítíðartilboð eyðkenna góða býin, har borgarin og lívsgóðskan verða sett í hásæti…

Og tú hevur nógvar møguleikar í Klaksvík: Arbeiðsmarknaðurin er fjølbroyttur, familjan hevur tað gott, og ansingartilboðini til børn eru fleiri, eins og tilboð eru til børn við serligum tørvi.

Í Klaksvík eru eitt nú frítíðarskúli og fólkaskúli. HF skeið, Tekniskur skúli, Sjónám, Húsarhaldsskúli, og Klaksvíkar Kvøldskúli, ið er ein kvøld-, ungdóms- og listaskúla.

## ÍVERKSETARAHÚSIÐ



Kundi tú hugsa tær tína egnu fyritøku? Og hevur tú kanska eitt gott hugskot til ein nýggjan handil ella eina nýggja framleiðslu?

Bæði í Føroyum og uttanlands hevur týdningurin av íverksetan seinru árini fingið størri og størri umrøðu. Og fyrsta føroyska íverksetarahúsið er í Klaksvík.

Í Íverksetarahúsinum fært tú m.a. vitan og íblástur til hvussu tú kanst stovnseta tína egnu fyritøku, og hvussu tú kanst fáa patent uppá tína egnu uppfinning.





# SVIMJIHØLLIN

Svimjihøllin varð tikin í nýtslu í 1974 og er síðani útbygd fleiri ferðir. Í dag er Svimjihøllin útgjørd við 25 metrar kappingarhyli, baðilandi við 25 metrar langari øku, fossum, vatnkanónum og bobluøki. Harumframt er sauna, hitarúm, heilsuklivar, fitness og café í høllini.













## STAÐIÐ FYRI ALLA FAMILJUNA



# KLAKSVÍKAR ÍTRÓTTARDEPIL

Klaksvíkar kommuna eigur og rekur báðar ítóttarhallirnar í Klaksvík: Klaksvíkar Ítróttarhøll og Badmintonhøllina, sum eru samanbygdar. Til ber at leiga báðar hallirnar til tiltøk, eins og til venjing fastar tíðir hvørja viku.

Umframt Svimjihøllina og báðar ítróttarhallirnar, hevur Klaksvík tvær fimleikarhallir og ein uttandura fótbótsvøll.





# 60 +

Eisini sum eldri er gott at búgva í Klaksvík, og bæði almennu og privatu tilboðini eru fleiri, teirra millum Hugni, ið er fyrsta pensionistafelagið í Føroyum, og sum varð stovnað í 1971, Dagtilhaldið Sóljan, Virkishúsið Smæran, Ven og virka, eldrasvimjing, mattænasta, og eldraráð.

Norðoya Ellis- og Vistarheim, Norðoya Røktarheim, Sambýlið á Heygnum, Sambýlið í Bøgøtu, og Heimið við Vágnað eru bústovnar til eldri og óhjálpin. Harumframt eru 24 eldraíbúðir undir Kráarbrekku, ið eru annaðhvørt 50 ella 70 fermetrar.











# GÓÐAR UMSTØÐIR TIL RÁÐSTEVNUR…



Tá hugsað verður um hvussu stóran týdning sjóvinnan hevur fyri føroyska samfelagið, eins og hvussu umráðandi tað er fyri vinnulívið at gera vart við seg og knýta bond, er altjóða sjóvinnumessan Atlantic Fair av alstórum týdningi.

Atlantic Fair verður hildin í Klaksvík, og hetta er ikki uttan orsøk. Umstøðurnar – við eitt nú tveimum samanbygdum ítróttarhallum, eru av teimum bestu, eins og vinnulívið hevur stóran týdning fyri býin.

Atlantic Fair verður hildin annaðhvørt ár í Klaksvík.











# KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS

## KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS VEITIR TÆNASTUR TIL LOKALØKIÐ OG SJÚKLINGAR ÚR ØLLUM FØROYUM.



Omanfyri havnalagið á vestursíðuni í Klaksvík finnur tú Klaksvíkar Sjúkrahús, ið er tað eina av trimum sjúkrahúsum í Føroyum.

Talan er um eitt nýmótans sjúkrahús, ið hevur 24 seingjarpláss, og er útgjørt við kirurgiskari, medisinskari og skurðdeild, og annars við eitt nú skaðastovu, rannsóknarstovu, røntgen, fysioterapi og ergoterapi. Klaksvíkar Sjúkrahús veitir tænastur til bæði lokaløkið eins og sjúklingar úr øllum Føroyum.

Fyrsta sjúkrahúsið, sum í dag er tikið niður, varð bygt í 1898, og vóru tað fólk í Norðoyggjum og Eysturoynnið, sum tóku hetta stig undir leiðslu av danska læknanum Bartsch, sum kom til Klaksvíkar í 1891.

Peningarinnsavningin royndist væl, og tá sjúkrahúsið fór til verka í 1898, vóru allar rokningarnar goldnar.

Síðani tá er sjúkrahúsið útbygt fleiri ferðir, eitt nú við bygninginum frá 1928, sum í dag er elsti parturin av sjúkrahúsinum, í 1960, tá høvuðs- og starvsfólkabygningurin verður tikin í nýtslu, og í 1984, tá Norðoya Røktarheim og Klaksvíkar Sjúkrahús gera ein felags bygning afturat verandi sjúkrahúsi.

150 fólk starvast á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

**Akutt tel. 112**
**Vaktlækni tel. 1870**
**Klaksvíkar Sjúkrahús tel. 454545**





# EVENTS



## Á TORRADØGUM GANGA VINNA OG MENTAN HOND Í HOND…

Fremstu politikkararnir í Føroyum, ein royndur vertur og ein rúgva av áhoyrarum. Hesin er pallurin, tá kjakið um ymisk viðurskifti í fiskivinnuni fer fram á árligu Torradøgunum í Klaksvík. Harumframt eru ein ørgrinna av tiltøkum um allan býin vikuna Torradagar fara fram.

Torradagar byrja frá gamlari tíð um mánaðarskiftið januar/februar, og eru m.a. ein ábending um at nú gongur móti ljósari tíðum, og at fiskurin kemur inn á grunnarnar at gýta – nakað, ið útróðrarmenn vita alt um, og sum eisini er staðfest í hugtakinum Torraleiðir.

Fyrstu Torradagarnir vórðu hildnir í 2007, teir eru í seinra helmingi av februar, og skráin fevnir um eitt nú kjakfundir, fyrilestrar, samrøður, framsýningar, konsertir og siðsøguligir túrar. Harumframt gera matstovur og handilslívið nógv burturúr Torradøgunum, eitt nú við Langum leygardegi.

Eini 3.000 fólk vitja tiltøkini Torradagarnir, ið umfata bæði vinnu- og mentanartiltøk.





*Bæði børn og vaksin glaða seg til Jólaskipið, sum síðani 1991 hevur verið ein fastur táttur í Klaksvík undan jólum.*









*Dragin, sum í dag er umbygdur til eitt sera vakurt seglskip, er upprunaliga bygdur sum útróðrarbátur. Í dag verður Dragin brúktur sum skúlaskip og til útferðir.*



# NORÐOYASTEVNA





Ongastaðni í heiminum finnur tú nakað, ið minnir um føroyskan kappróður. Bátarnir, ið eru í alskyns litum, eru serføroyskir og sera vakrir, og so er kappróður tjóðarítrótt føroyinga.

Kappróðrarárið byrjar á Norðoyastevnu og endar á Ólavsøku, og her verður kappast í bátum í ymiskum støddum eins og talan er um bæði kvinnur og menn, ið rógva.

Fyrsta Norðoyastevnan varð hildin í Klaksvík í 1936, og í dag telur skráin á Norðoyastevnu eitt nú kappróður, midnáttarsamkomu við røðu, sangi, tónleiki og fýrverki, kabarett, listaframsýningar, og býarlív…



## FYRI BØRN OG BARNSLIGAR SÁLIR



## TÓNLEIKUR OG UNDIRHALD Á FLEIRI PALLUM



# SUMMAR-FESTIVALUR





Tónleikur og undirhald á fleiri pallum, franskir hotdogs, festivalbúffar, grýturættir úr Fjarðeysturi ella okkurt heilt annað, ein nýggjur býur í býnum, ið telur eini 800-1000 fólk, ið búgva í húsvognum, og ein serligir hýrur við bátabrúgvarnir, har fólk hugna sær umborð á stuttleikabátunum, áðrenn farið verður í býin…

Hetta er bara ein lítið mynd av Summarfestivalinum, sum fyrstu ferð varð hildin í 2004, og sum síðani – við eini 8.000 vitjandi, er vorðin hin størsti í Føroyum.

Summarfestivalurin hevur eina fjølbroytta skrá, ið fevnir um alskyns slag av føroyskum tónleiki, og her bæði nýggir og eldri føroyskur tónleikur er á palli.

Harumframt telur Summarfestivalurin eisini kendar bólkar og einstaklingar úr útheiminum, og eitt nú hava Ken Hensley, Scorpions, Roger Hodgson, Robin Gibb, Shakin' Stevens, The Rasmus, Smokie, Kim Larsen, Anne Linnet, Brian McFadden, Mika og Westlife havt konsertir á Vágsbøi í Klaksvík.

# SJÓMANNADAGUR

Føroyingar hava altíð verið tengdir at havinum. Havið var sambindingarliðið millum oyggjarnar og millum Føroyar og útheimin. Og føroyingar høvdu hjallin á sjónum.















Í dag eiga føroyingar ein av heimsins mest framkomnu fiskiflotum, eins og føroysk reiðarí eru við í eitt nú ferðavinnu, farmavinnu og oljuvinnu, og harumframt sigla nógvir føroyingar við útlendskum skipum, har teir ofta eru at finna á brúnni og í maskinrúminum.

Við so nógvum og fjølbroyttum virksemi var tí hildið at Føroyar eiga at hava ein dag, ið hátíðarheldur maritima gerandisdagin.

Fyrsti Sjómannadagurin varð hildin í 2005, og síðani er dagurin støðugt – við kappingum, hvørs støði er gerandisdagurin á sjónum, framsýningum við livandi fiski og siðsøguligum skipum, listaframsýningum og øðrum mentanartilboðum, eins og bryggjudansi um kvøldi, vorðin meiri og meiri fjøltáttaður. Og alt í einum sera hugnaligum huglagi, har so at siga øll tiltøkini eru ókeypis.

Eini 5.000 fólk vitja Sjómannadagin, ið er ein familjudagur, sum verður hildin leygardag miðskeiðis í august mánað.









# FERÐAVINNAN



Vitin á Kallinum, ið er norðasta staðið á Kalsoynnið. Tað tekur umleið ein hálvan tíma at ganga norður á Kallin av Trøllanesi, og tað er lætt gongt.

Fleiri og fleiri ferðafólk vitja í Klaksvík og í Norðoyggjum, eitt nú økist talið av risastórum ferðamannaskipum støðugt. Og her er nógv at fara til: Náttúran er sera vøkur, fjøllini eru høg, fjølbroytt og stórsligin – og fleiri teirra eru løtt atkomilig. Handils- og mentanarlívið er fjølbroytt, gistingarmøguleikarnir eru fleiri eins og fleiri matstøð eru í at velja. Tú kanst koyra til vøkru viðarlundina úti í Grøv, og til ber at síggja Christianskirkjuna, ið er størsti arkitektoniski varðin í Klaksvík.

Úr Klaksvík er eisini koyrandi til Kunoynnað og Viðoynnað, og tað tekur einar 20 minuttir við ferju at sigla til Kalsoynnað, har tú eitt nú sært Kópakonuna í Mikladali, og av Trøllanesi kanst ganga norður á Kallin. Við ferðamannaskipi slepst til útoyggjarnar Svínoy og Fugloy frá Hvannasundi á Viðoynnið. Og á Viðareiði finnur tú eisini heimsins hægsta forberg – Enniberg, ið er 750 metrar høgt.

Fleiri serlig tiltøk eru eisini í Klaksvík: Í februar eru Torradagar, í juni Norðoyastevna, og í august mánað eru Summarfestivalur og Sjómannadagur.















# FRAMTÍÐ



KLAKSVÍK CITY CENTER - Biskupstorg

# BÝRÁÐSLIMIR

# OG NEVNDIR



*Jógvan Skorheim, borgarstjóri*



*Signhild V. Johannesen*



*Óli M. Lassen*



*Kristian Eli Zachariasen*



*Tummas J. Lervig*



*Beinta Klakstein*



FÍGGJARNEVNDIN
Jógvan Skorheim, borgarstjóri og formaður
Signhild V. Johannesen, næstforkvinna
Tummas J. Lervig
Gunvá við Keldu
Herfrí J. Sørensen

"Fólkatalið í kommununi veksur og vinnu- og mentanarlívið blómar. Framtíðin verður skapt við skynsamari fíggjarsýring, ið tryggjar, at Klaksvíkar kommuna altíð er við í fremstu røð."



"Eitt ríkt og fjølbroytt mentanarlív skapa trivnað, framburð og menning"

MENTANARNEVNDIN
Signhild V. Johannesen, forkvinna
Beinta Klakstein, næstforkvinna
Óli M. Lassen
Gunvá við Keldu
Atli S. Justinussen



"Vinnulív skal hava góðar umstøður at virka og mennast, bæði á sjógvi og á landi."

HAVNA- OG VINNUNEVNDIN
Tummas Lervig, formaður
Kristian E. Zachariasen, næstformaður
Óli M. Lassen
Atli S. Justinussen
Beinir Johannesen



"Klaksvíkar kommuna skal verða ein kommuna fyri øll. Barna- og ungdómlívið skal vera nakað, sum vit allatíðina endurskoða og raðfesta høgt. Hetta er tað, ið skapar bestu ringrás fyri góðum trivnaði í kommununi."

TRIVNAÐARNEVNDIN BØRN & UNG
Beinta Klakstein, forkvinna
Signhild V. Johannesen, næstforkvinna
Tummas J. Lervig
Beinir Johannesen
Herfrí J. Sørensen



"Tað skal verða gott at liva og eldast í Klaksvík. At kunna virka og hava ávirkin á egið lív so leingi sum gjørligt gevur lívsgóðsku og tað vilja vit skapa karmar fyri."

TRIVNAÐARNEVNDIN ELDRI & BÚSTAÐIR
Beinta Klakstein, forkvinna
Signhild V. Johannesen, næstforkvinna
Kristian E. Zachariasen
Gunvá við Keldu
Herfrí J. Sørensen



"Nýskipan, nýhugsan og fjølbroytni skal verða drívmegin at halda Klaksvíkar kommunu í fremstu røð!"

UMHVØRVIS- OG BÝARSKIPANARNEVNDIN
Kristian E. Zachariasen, formaður
Óli M. Lassen, næstformaður
Signhild V. Johannesen
Gunvá við Keldu
Beinir Johannesen



"Um vit framvegis skipa menning og gróður - gerst býðurin okkum góður!"

TEKNISKA NEVND
Óli M. Lassen, formaður
Tummas J. Lervig, næstformaður
Beinta Klakstein
Atli S. Justinussen
Steinbjørn O. Jacobsen



*Gunvá við Keldu*



*Herfrí J. Sørensen*



*Atli Steinbjørn Justinussen*



*Beinir Johannesen*



*Steinbjørn O. Jacobsen*




ÚTGEVARI: KLAKSVÍKAR KOMMUNA WWW.KLAKSVIK.FO · SNIÐGEVING: GRAFIA · MYNDIR: GRAFIA, NORÐLÝSIÐ, EYDBII | MYNDIR, SUMMARFESTIVALURIN, FOTOSTUDIO, PETUR MARTIN SOLMUNDE OG DÁVUR WINTHER

**www.klaksvik.fo**